**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein

# Frískar røtur

**BØRN** Í ØLLUM **ALDRI** FINGU **FYLT** OYRU OG EYGU Á **KONSERTUM** VIÐ **KULUM RÓTUM**, SUM ERU **FRÍSKAR** VIÐ NÝGGJARI **FLØGUÚTGÁVU**



*Rakul Ró er ein av nýggju sangarunum í Kulum Røtum*



*Beinir Troest roynir seg nú eisini sum kul rót saman við Jógvani Hansen*

MYNDIR: BARBARA NYGAARD

Børn og vaksin tóku væl ímóti Frísku Kulu Rótunum, sum vóru á palli í Løkshøll í mentanarvikuni. Tað var stúgvandi fult til báðar konsertirnar, og børn í øllum aldri fingu eisini fylt oyruni og eyguni hesa løtuna.

Konsertirnar við Kulum Rótum vóru í sambandi við nýggja útgávu – Frískar Kular Røtur – og at bólkurin hevur rundað 10 ár.

Á konsertini kundu fólk so uppliva tær góðu, gomlu røturnar og tær nýggju, frísku.

Konsertin byrjaði við at Steintór Rasmussen, sum er upphavið hendan stóra sangskattin hjá føroyskum børnum, bjóðaði vælkomin, og so yvirtóku ein væl upplagdur Jógvan Hansen og grønir menn frá Pluto. Myndir komu á stórskíggja og tónleikarar komu fram á pallin. Meðan eiturkoppar komu krúpandi og summarfuglar sveimaðu á teldugjørdu pallmyndini ,ljómaðu gomlu hittini og frísku nýggju sangirnir frá Kulu Rótum.

Millum teir garvaðar sangarar og tónleikarar smæddust tær báðar nýggju stjørnurnar, Rakul Ró og Beinir Troest, heldur ikki burtur. Tvørturímóti. Tey dugdu sera væl at fylla høllina við hjartaligum sangi, livandi orku og góðari barnsligari nærveru.

Talan var um eina sitikonsertir, og sjálvt teir smæstu áhoyrararnir kláraðu at sita stillir. Kanska var orsøkin einfalt tann, at tað allatíðina hendi okkurt spennandi á pallinum, og ein steðgur var miðskeiðis í konsertini.

Eftir ein góðan kaffimunn, saft og køkur, var tað ein fragd at koma innaftur og síggja Lukas Nygaard dansa Michael Jackson. Sanniligt eisini ein kul framførsla. Hugaligt at uppliva føroysk børn og ung nú danska Talentkappingin í sjónvarpinum er at enda komin.

Kular Røtur eru við nýggjari fløgu og konsertum veruliga komin inn á føroyska tónleikapallin aftur – og tað eru mong ivaleyst glað fyri.

## INNIHALD


2 KLUMMAN: **DUGNALIGU FØROYINGARNIR**
4 INTEVIEW: **HANS EDWARD ANDREASEN**
6 TIPS: **BØKUR TIL VETURIN**
8 BAKGRUND: **RÆÐSLAN Í MALMØ**
10 BRÚKIÐ TOY **Á NÝGGJAN HÁTT**
11 90 SEKUND: **ELI HENTZE**
12 BAKGRUND: **STJÓRAR FARA ÚR GLÓÐHEITUM SESSUM**
14 TIL ARBEIÐIS: **HANS TÓRGARÐ**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 SØGAN UM **JOSEPHINE BAKER**
22 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
23 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
24 VIKUMYNDIN: **MARGARETH THATCHER**


## KLUMMAN



*Uni Holm Johannesen*

# Dugnaligu føroy-ingarnir

Ein teldupostur kom buldrandi í postkassan hjá mær ein dagin. Tað vísti seg, at eg hevði stavað eitt orð skeivt á portalinum.

»Eitt gott dømi um, at tú/tit ikki duga at stava!!! Tykkara vánaligi portalur skuldi farið á skeið í stavseting, og tað skjótt eisini!!«, varð skrivað. Viðkomandi segði ikki so frægt, hvat orð var skeivt stavað.

Jú, takk – men hvat er endamálið við teldupostinum?, hevði eg hug at spyrja viðkomandi.

Hetta er ikki eitt eindømi. Hvønn gerandisdag skræða óræddir føroyingar seg við eins tápuligum viðmerkingum á portalinum og kjaksíðum.

Eg visti, at fjølmiðlastarvið er nógv útsett. Fleiri liva fyri at leggja eftir fjølmiðlunum og hava lítið annað at brúka sína tíð til enn at gera vart við mistøk. Hvønn dag fáa vit at vita, at vit gera eitt vánaligt arbeiði og duga ikki okkara arbeiði.

Tit eru vælkomin. Eg hugsi, at tað er ein partur av okkara menning.

Men flestu viðmerkingar eru á so lágum støði og so tápuligar, at tað er ikki vert at hugsa meira um.

Eg veit fullvæl, at eg traðki við síðuna av og geri mistøk. Og eg eri glaður fyri, at fólk siga frá. Men ofta er tað so tápuligt og arrogant, at eg tími ikki at hugsa meira um tað.

Tað er ikki undarligt, at journalistar eru nógv útsettir.

Tá eg tendri útvarpið klokkan 12.20, veit eg akkurát, hvat Høgni Djurhuus hevur gjørt, síðan hann kom til arbeiðis.

Tá eg trýsti meg inn á Vágaportalin, síggi eg, hvussu arbeiðsdagurin hjá Ólavi í Beiti hevur háttað seg.

Tá eg tveiti meg á sofuna klokkan 19.00, fái eg staðfest, hvat Grækaris Djurhuus Magnussen hevur gjørt seinastu tímarnar.

Hvønn dag.

Tey vísa mær, hvat tey hava fingið burtur úr arbeiðsdegnum. So kann eg gera av, um eg haldi tað er nøktandi ella ikki. Journalistar eru fyri so vítt til próvtøku hvønn dag – í føroyskum máli og journalistiskum handverki.

Slíkt dagligt eftirlit havi eg ikki við fólkaskúlalærarunum, skiparunum, starvsfólkunum á almennu miðfyrisitingini og øðrum klókum akademiskum høvdum.

Hyggið rundan um tykkum. Tað eru bara journalistarnir, sum eru verdir at fleingja.

Hví ikki koma við stimbrandi viðmerkingum, sum onnur kunnu brúka til nakað, heldur enn at rópa hart um einki? Hví ikki lyfta í felag? Nær eru flestu føroyingar blivnir so dugnaligir, at teir kunnu traðka onnur niður, sum tað passar teimum?

Hví bara síggja flísina í eygunum á øðrum, men ikki vera varugur við bjálkan í sínum egna eyga?

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Hans Edward Andreasen / Pressumynd